FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 23. juni 2020
J. nr.: 20/00295
Viðgjørt: BAB

Svar upp á fyrispurning nr. 99/2019 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurningur frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, viðvíkjandi atkomuviðurskiftum í almennum bygningum

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógvir almennir bygningar eru, har rørslutarnað, t.d. fólk í koyristóli, ikki hava góð atkomuviðurskifti?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at oyramerkja pening á fíggjarlógini til at betra um atkomuviðurskiftini í landsins bygningum komandi árini?

Svar:

Fleiri almennir bygningar lúka ikki krøv um nøktandi atkomuviðurskifti. Landsverk sigur seg altíð raðfesta lógarkrøv til landsins bygningar frammarlaga, tá ið viðlíkahald og umraðfestingar verða gjørdar á landsins bygningum.

Lógarkrøv spenna vítt og fevna um alt frá atkomu, bruna og inniklima (komfort og krøv frá arbeiðseftirlitinum), umframt mangt annað. Játtanin til viðlíkahald er avmarkað, og tí er trupult at náa øllum. Tað verður í hvørjum ítøkiligum føri mett, hvussu játtanin skal nýtast. Í høvuðsheitum verður játtanin nýtt til viðlíkahald, so umstøðurnar hjá brúkarum og starvfólkum er á einum tryggum støði.

Svar til spurning 1:
Landsverk upplýsir, at 40 bygningar hava góð atkomuviðurskifti. 10 bygningar hava minni góð atkomuviðurskifti og krevja minni ábøtur. 89 bygningar hava ikki nóg góð atkomuviðurskifti og krevja størri ábøtur.

Svar til spurning 2:
Ásannast má, at neyðugt verður at raðfesta atkomuviðurskiftini. Eg fari at taka spurningin upp við Landsverk um, hvussu vit kunnu náa hesum komandi árini.

Tinganes, 23. juni 2020

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum